# Flokkarnir um fólkaskúlan

**ÚTBÚGVING**

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Heimasíðan hjá Skúlablaðnum hevur verið væl vitjað og endurgivin seinastu dagarnar. Orsøkin er tann, at blaðið hevur lovað politisku flokkunum framat at siga sína áskoðan um fólkaskúlan. Við loyvi frá blaðnum prenta vit her svarini frá flokkunum. Av tí at tilfarið er somikið rúgvismikið, verða nakrir av flokkunum eisini prentaðir í morgin.

Sambært skúlablaðnum, hevur blaðið sett flokkunum nakrar spurningar á økjum, sum tey halda vera sera týdningarmikil hjá næstu samgongu at fáa loyst. Tilfarið er skipað soleiðis, at flokkarnir svara stutt og greitt. Skúlablaðið sigur, at stevnuskráirnar nevna nógv av hesum viðurskiftum, men eru ofta orðaðar soleiðis, at tær eru lítið ítøkiligar.

- Vit skulu heilt ítøkiliga vita, hvat hesir flokkarnir standa fyri og hava sett sær fyri at fremja, koma teir í samgongu, sigur Skúlablaðið, sum er at finna á skulabladid.fo.




FÓLKAFLOKKURIN

## PISA: Topp 10 innan 10 ár

**Útbúgvingin hjá lærarum**

*Ætlanin er at læraraútbúgvingin verður umskipað til eina bachelor útbúgving. Ynskið hjá Føroya Lærarafelag er, at ein 5 ára kandidatútbúgving verður viðtikin beinanvegin og fer í gongd í 2009 – við samsvarandi lønarlagi sum aðrar kandidatútbúgvingar. Hvør er tykkara støða til hetta?*

Fólkaflokkurin tekur undir við uppskotinum, sum landsstýrismaður floksins legði fram á ting 2. nov. 2007, og í uppskotinum er møguleikin opin fyri bæði BA og MA innan allar útbúgvingar. Spurningurin um, hvussu læraraútbúgvingin skal skipast í framtíðini, hoyrir heima í tí nýggju lógini, sum skal gerast um læraraútbúgvingina. Álitið er hálvt annað ára gamalt, og í hesum dynamisku tíðum er talan um langt tíðarskeið. Fólkaflokkurin er sjálvandi opin fyri spurninginum, um hetta skal takast upp til nýggja viðgerð, og harvið at hyggja uppá, um MA møguleikin skal takast við nú beinanvegin. Ætlanin hevur verið, at nýggj lóg um læraraútbúgving skuldi samtykkjast í vár, soleiðis at tey lesandi, sum verða upptikin í summar, skuldu útbúgvast sambært tí nýggju lógini. Spurningurin er, um hetta nú er realistiskt, men Fólkaflokkurin vil arbeiða fyri, at hetta verður framt sum skjótast.

*Hvussu halda tit so, at lærararnir í føroyska fólkaskúlanum eiga at verða útbúnir og uppstigaðir?*

Hægri útbúgvingar bera mangan hægri løn við sær, men lønarspurningurin verður avgjørdur millum lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum og Lærarafelagið, og vit halda ikki, at tað er rætt at viðgera ein slíkan spurning beint upp undir val.

**Býtið millum land og kommunu**

*Føroya Lærarafelag saknar eina greiða útmelding um, hvat politisku flokkarnir vilja, tá ið tað snýr seg um býtið millum land og kommunu á skúlaøkinum.*

*Ganga tit inn fyri 6-7 tvingaðum kommunalum økjum, og at hesi økini umsita fólkaskúlan fult og heilt?*

Fólkaflokkurin gongur inn fyri greiðum uppgávubýti og ábyrgdarbýti millum land og kommunur og heldur, at fleiri uppgávur skulu flytast frá landinum til kommunurnar at umsita. Eldraøkið og fólkaskúlin skulu vera tey fyrstu. Flokkurin vil tó ikki tvinga kommunurnar saman, men mælir til, at tað í øllum førum verða skipað skúlaøki, har øll undirvísingin í økinum verður samskipað.

*Um so er, hvørja tíðarásetting seta tit á, at hetta skal verða framt?*

Hetta skal verða gjørt í næsta valskeiði.

**Stórir og smáir skúlar**

*Í Føroyum eru 57 fólkaskúlar, nógvir teirra eru smáir. Hvør er tykkara støða til skúlastøddir, og eftir hvørjum leisti eiga skúlar at verða samanlagdir, um so er, at teir skulu tað?*

Hetta við smáum og stórum skúlum er ein trupul spurningur. Hóast best er, at eindirnar eru rímiliga stórar, ber ikki til at siga, at smáir skúlar ikki eisini kunnu vera góðir. Tí heldur Fólkaflokkurin, at skúlaøkini sjálv skulu gera av, hvørjir skúlar skulu verða nýttir, og hvørjir ikki – eisini um tað skulu vera stórir skúlar ella bæði smáir og stórir í einum øki. Lærararnir verða settir í økinum og kunnu tískil undirvísa í øllum skúlunum í økinum.

*Vilja tit stuðla kommunum í sambandi við bygging av nýggjum skúlum, ið eru úrslit av samanleggingum?*

Fólkaflokkurin heldur, at vit skulu halda fast við, at kommunurnar byggja og gjalda sínar skúlar sjálvar – her eigur ábyrgdarbýtið eisini at vera greitt.

*Tá ið talan er um samanlegging – eru tit sinnað at varðveita verandi tímajáttan, hóast skúlar verða lagdir niður, hetta so at fleiri lærarar vera til t.d. yngru árgangirnar? Ella hugsa tit samanlegging bara við sparing fyri eygað?*

Fólkaflokkurin hugsar ikki um samanlegging bert við sparing fyri eygað, tí eingin ivi er um – serliga tá ið vit hugsa um PISA-kanningina – at okkum tørvar at endurskoða fleiri ting í skúlaskipanini. Tí eru vit til reiðar at viðgera spurningin, um tað ikki er rætt at varðveita verandi tímajáttan, hóast - ella kanska sum viðurlag fyri at skúlar verða niðurlagdir. Men tað kundi verið so nógv annað, ið tímajáttanin eisini kundi verið nýtt til. Spurningurin um tímabýtið verður altíð aktuellur, og tað kann ikki roknast við, og eigur ikki at verða roknað við, at vit eina ferð med alla fara at finna fram til tað rætta tímabýtið. Hetta eigur at vera støðugt samrøðuevni í skúlanum – eisini millum Lærarafelagið, Mentamálaráðið, landsstýrismannin og ta politisku skipanina!

**Næmingar við serligum tørvi**

*Fólkaskúlalógin ásetir, at fólkaskúlin er fyri øll – sama hvønn tørv næmingurin hevur. Veruleikin er, at í fólkaskúlanum eru nógvir næmingar við serligum tørvi, sum ikki fáa nøktandi undirvísing. Hvussu skipa vit fyri, at tey veiku í okkara skúla, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa eitt nøktandi skúlatilboð?*

Alt eigur at verða gjørt fyri, at eisini tey veiku, atferðartruplir næmingar og onnur við serligum tørvi fáa góð skúlatilboð. Fólkaflokkurin vil halda fram við arbeiðinum, sum okkara landsstýrismaður hevur sett í verk á hesum økinum. Tær sernámsfrøðiligu tænastueindirnar, NSR-tænastan, skal fáast at virka um alt landið. Royndirnar í Eysturoynni, har tænastan fyrst fór at virka, hava verið stak góðar. Endamálið er, at foreldur skulu kunna venda sær hagar og fáa alla ta hjálp, ið tørvur er á.

Síðsta vár vórðu fleiri lógarbroytingar gjørdar, sum miða ímóti, at tey veiku, atferðartruplir næmingar og onnur fáa nøktandi skúlatilboð. Heimilað er nú eisini at seta á stovn serligt skúlatilboð fyri næmingar við atferðar- o. ø. trupulleikum. Arbeiðast skal víðari við hesum.

*Eiga næmingar at verða býttir upp eftir førleika, evnum, atferð ella øðrum?*

Útgangspunktið er, at næmingurin hoyrir til flokkin, men tað er ofta komið fram – eisini í PISA-niðurstøðuni – at bæði fakliga veikir og fakliga sterkir næmingar fáa ov lítlar avbjóðingar. Tí er lógarbroyting gjørd, sum gevur møguleika fyri at skipa bólkar, so næmingar fáa hóskandi undirvísingarligar avbjóðingar. Hetta kunnu vera næmingar, sum eru á sama fakliga stigi, ið kunnu stimbrast í einum øðrvísi samansettum bólki, enn flokkurin er. Men næmingar kunnu í mesta lagi helvtina av undirvísingartíðini fáa undirvísing í bólkum uttan fyri flokkin. Endamálið við øllum hesum má vera, at øll fáa hóskandi undirvísingarligar avbjóðingar.

SAMBANDFLOKKURIN

## Størri s
## ligar og

**Útbúgvingin hjá lærarum**

*Ætlanin er at læraraútbúgvingin verður umskipað til eina bachelor útbúgving. Ynskið hjá Føroya Lærarafelag er, at ein 5 ára kandidatútbúgving verður viðtikin beinanvegin og fer í gongd í 2009 – við samsvarandi lønarlagi sum aðrar kandidatútbúgvingar. Hvør er tykkara støða til hetta?*

Sambandsflokkurin tekur undir við eini 5 ára kandidatútbúgving fyri at lyfta fakliga undirvísingarstigið. Samstundis er neyðugt at verandi lærarar fáa møguleikar fyri eftirútbúgving í nógv størri mun enn í dag! Lønin vil altíð verða ein samráðingarspurningur millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, og politiskt verður ikki lagt seg út í tann partin.

JAVNAÐARFLOKKURIN

## Skúli o
## at byrg

**Útbúgvingin hjá lærarum**

*Ætlanin er at læraraútbúgvingin verður umskipað til eina bachelor útbúgving. Ynskið hjá Føroya Lærarafelag er, at ein 5 ára kandidatútbúgving verður viðtikin beinanvegin og fer í gongd í 2009 – við samsvarandi lønarlagi sum aðrar kandidatútbúgvingar. Hvør er tykkara støða til hetta?*

Javnaðarflokkurin hevur sett sær fyri, at læraraútbúgvingin skal vera á kandidatstøði. Tað hava vit eisini sett í valskránna fyri løgtingsvalið 2008. Tó ásanna vit, at tað tekur tíð at uppbyggja slíka útbúgving, tí tað tekur tíð at fáa kvalifiseraðar undirvísarar á Fróðskaparsetur Føroya, har Læraraskúlin verður ein deild. Okkara fyrimyndir í hesum eru finsku og íslendsku læraraútbúgvingarnar. Við hesum fáa vit lærarar við høgum fakligum førleika og harvið eisini virðing um fakið.

**Býtið millum land og kommunu**

Føroya Lærarafelag saknar